# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Koyrt 363 túsund við Peugeot

Tá Jógvan Páll Johannesen í Vestmanna, í september í 1996, keypti ein nýggjan Peugeot 106 diesel fyri 119.000 krónur, roknaði hann ikki við, at hann kundi koyra 363.000 kilometrar við einum so bíligum bili.

Trúliga hevur hann koyrt ímillum Vestmanna og Havnina hesi árini.

Jógvan Páll hevur, stórt sæð, koyrt allar kilometrarnar sjálvur. Bilurin hevur verið sera økonomiskur øll árini, hann koyrir góðar 20 km/l.

Bilurin hevur skift kamreim á motorinum tríggjar ferðir, hann hevur fyri kortum skift akkumulatorin fyri fyrstu ferð, og koblingin er ongantíð skift. Bilurin koyrir fint enn. Jógvan Páll hevur nú keypt sær ein nýggjan Peugeot. Hesaferð ein 206 Hdi.

mg




*Jógvan Páll Johannesen (v.m.) fær her handaðan ein nýggjan Pougeot 206 frá Páll Danielsen, sølumanni hjá Auto Service. Gamli grøni Peugeot 106 (NU 172) og tann nýggi silvurgrái Peugeot 206 Hdi.*

# Fríðrikur er ársins Samurai

Bridgestone Danmark A/S hevur kosið Fríðrik Bláhamar, stjóra á Super Dekk í Havn, sum »Årets Samurai« fyri sítt arbeiði fyri at menna First Stop dekk-ketuna í Føroyum

Undir eini móttøku fyri yvir hundrað First Stop umboðum í Danmark, varð Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk, kosin »Årets Samurai« fyri sítt arbeiði fyri at menna og marknaðarføra First Stop dekk-ketuna í Føroyum.

»Årets Samurai« er ein útnevning sum Bridgestone Danmark A/S á hvørjum ári geva einum av teirra First Stop umboðum. Heiðurin fer til ein persón, sum hevur gjørt nakað serstakt fyri First Stop dekk-ketuna.

Super Dekk er sjálvstøðugur partur av stóra samtakinum First Stop, sum telur yvir 1600 dekk- og bilutahandlar í øllum Evropa. First Stop er eitt partnaraskapssamtak, ið umfatar sjálvstøðugar dekksølur, sum bjóða tænastu á sera høgum støði.

Samurai er japanskt og merkir: Maður í japanska hermanna-aðalinum, sum var í tænastu hjá stórmanni. »Årets Samurai« fekk m.a. diplom og ein serligan Ferrari jakka.

mg

*Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk, er kosin »Årets Samurai«*






*Suzuki B-King hevur 4 syl. vatnkøldan motor við 1.340 kubikkum og 184 hk*

# Suzuki B-King

**Japanska Suzuki verksmiðjan er ein av heimsins størstu motorsúkkluverksmiðjum við einum stórum programmi við nógvum ymiskum motorsúkklum.**

Ein av nýggjheitum frá Suzuki er B-King, sum er ein tekniskt framkomin súkkla við rættiliga sermerktum designi. Ein sonevnd »nakedbike«.

Hendan Suzuki B-King varð fyrstu ferð sýnd fram sum »showbike« á Tokyo Motor Show í 2001 og er nú komin á marknaðin.

Suzuki B-King hevur 4 syl. vatnkøldan motor við 1.340 kubikkum og 184 hk við 9.500 snún/min. Botntrekkið er 146 Nm við 7.200 snún/min. B-King hevur 6-gir og verður roknað sum ein kvik og heldur ógvuslig súkkla við ríkiligt av kraft og serliga sportsligum koyrieginleikum.

Tað er MC-Sølan á Norðasta Horni í Havn, sum umboðar Suzuki motorsúkklurnar.

Á heimasíðuni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leikjum til aðrar MC-síður.

Suzuki B-King kostar 151,700 krónur.

mg



*Smart instrumentborð við LED bensin- og hitamátarum*